## Knúst parabol

**Lítið hevur verið hjá løgregluni at gera um vikuskiftið. Men onkur smærri herverk hava verið, og eisini varð ein bilur stolin. Harafturat hevur onkur spælt sær av við koyrikortið**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

**Havn:** Politiið í Havn letur væl at vikuskift-inum, sum júst er farið afturum bak. Tað hevur verið friðarligt, men tó ikki so friðarligt, at teir sitið hendur í favn.

Ein bilur varð stolin av Spógvavegnum í Havn, og funnin aftur á Vegnum Langa. Hetta málið verður nú kannað.

Í einum garði í Havn hevði onkur eisini verið og vitjað. Henda vitjanin er ikki verið friðarlig, tí har hevur viðkomandi skrætt parabolina, sum hoyrdi til húsini niður, og knúst hana sundur.

### Seks koyrikort

Um vikuskiftið hevur politiið eisini verið úti við lasaranum. Hetta hevur við sær, at seks persónar missa koyrikortið. Fýra av teimum missa tað treytað, og hinir báðir missa tað treytaleyst. Tann, sum koyrdi skjótast av teimum, koyrdi 128 km/t.

Annars so hava fimm yvirnáttandi gestir ligið í brummuni í Havn um vikuskiftið.

Vestanstevnan hevur annars verið friðarlig. Ein vatnskaði var í einum húsum, av tí at í Stórá í Sandavági varð demmað uppfyri, og har fleyt yvir hóskvøldið beint eftir midnátt. Vatn kom inn í kjallaran á einum privathúsum, og førdi hetta til, at kompressarin í frystiboksini brendi saman.

# Upprunin skal hoyrast



*Týr hava júst givið fløguna Eric the Red út. Nú er mangt og hvat á skránni. Millum annað ein víkingafestivlaur í Póllandi. Her er Heri Joensen avmyndaður til Prix Føroyar í ár*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Tónleikabólkurin Týr er fyri stuttum givið út nýggja fløgu við heitinum, Eric the Red. Kvæði og fólkavísur eyðkenna fløguna, og er hetta ikki av tilvild. – Alt hevur fingið íblástur frá kvæðum, sum vit gera. Sumt minni beinleiðis og okkurt meira. Tað halda vit er ikki meira enn náttúrligt, tá ein er føroyingur, tí tað skal hoyrast, hvaðani ein kemur frá, sigur Heri Joensen, gittarspælari og sangari í Týr**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

»Eric the Red« er heitið á fløguni, sum føroyski tónleikabólkurin, Týr, gav út seinast í juni mánað. Eyðkennini fyri fløguna eru kvæði og fólkavísur. Løg sum Regin Smiður, Stýrisvølurin, Ólavur Riddararós, Ramund hin unge og The Wild Rover eru at finna ímillum tær 10 skeringarnar.

At kvæði og fólkavísurnar eru kennimerkini er ikki heilt av tilvild.

– Alt, sum vit gera, hevur íblástur frá kvæðum. Sumt minni beinleiðis og okkurt meira. Hetta halda vit er so upplagt tá ein er føroyingur, sigur Heri Joensen, sangari og gittarspælari í Týr.

– Tað er rættiliga vanligt, at tey, sum spæla metal-rock eru ímóti mainstream, tí tá hoyrir ein ikki, hvaðani tónleikurin er. Tá kann sangurin líka so væl vera frá Afrika sum Avstralia. Ein skal hava ljóð við, sum eyðkenna tónleikinum úr eins egna landi.

### Betri fløga

Týr gav fyri hálvum øðrum ári síðani út fløguna »How far to Asgaard«. Heri metir tó, at henda nýggja fløgan er nógv betri, bæði í dygd og í spæli.

– Vit hava verið í einum betri og dýrari studio, og vit hava verið nógv betri fyrireikaðir hesuferð. Vit spæla betri og ljóðið er eisini nógv betri. Stutt sagt, so hava vit gjørt okkum meira ómak, sigur Heri.

Fløgan er innspæld í Jacob Hansen studio í Jútlandi. Eric the Red kemur út eisini út øðrum londum. Týskalnd, Íslandi, Finland, Kanada og øllum teimum fyrrverandi londunum í Sovjetsamveldinum. Somuleiðis verður fløgan eisini send til Amerika til marknaðarføring har, og um hildið verður, at henda fløgan er betri enn tann fyrra, so vænta teir í Týr, at onkur har yviri fer at sýna teimum áhuga.

– Vit hava brúkt hálvt annað ár uppá at byggja okkum eitt netverk upp við tí fyrru fløguni. Tað hevur kravt nógv arbeiði, men tað ger tað nógv skjótari við tí nýggju, greiðir gittarspælarin frá.

– Tað hevur verið strævið, og tað er nógv arbeiði í tí. Og soleiðis hypotetiskt sæð, so sjálvt um fløgan er super, so vil tað ikki siga, at vit kunnu bróta ígjøgnum við henni.

Nógv verður eisini gjørt við marknaðarføring av hesi fløguni. Hon verður send til meira enn 100 ymisk fólk. Ummælarar og netbløð, og nú verður bara bíðað eftir, hvussu fløgan verður móttikin.

– Vit hava nóg mikið at gera nú. Vit bíða eftir, hvat fólk fara at siga. Serliga eru vit spentir uppá, hvussu fløgan verður móttikin í Íslandi. Um íslendingar lata væl at, so fara vit yvir at spæla.

### Til Póllands

Rockbólkurin hevur ikki verið nógv at hoyra í Føroyum seinastu tíðina. Teir vóru við á Prix Føroyum, har teir ikki megnaðu at koma í finaluna.

– Tað eru ikki so nógvar konsertir í Føroyum fyri okkum. Til dømis, so hevði tað ikki borið til hjá okkum at savna eina stóra áhoyrarafjøld í einum av teimum vanligu dansistøðunum, tí fólk høvdu ikki tímað at lurta eftir okkum, sigur Heri.

Men sjálvt um teir fýra í Týr ikki hava verið á palli her heima, so merkir tað ikki, at teir hava sitið hendur í favn.

– Fyrst í august mánað skulu vit á ein víkingafestival í Póllandi. Ein póllendingur hevur eitt felag, sum eitur Faroe Islands Enthusiast Society, sum er fyri fólk, sum hava áhuga fyri Føroyum. Hann hevur fingið okkum at koma niður har at spæla.

Á hesum víkingafestivalinum skulu Týr hava tríggjar konsertir. Fleiri konsertir vóru á skránni, men av tí at hesin póllendingurin ikki fekk tann stuðulin, sum hann hevði roknað við, so vórðu tær tiknar av skránni.

Nú verður so arbeitt við at fáa fleiri konsertir í lag í heyst, vetur og í vár, og kanska eisini finna onkran størri at umboða bólkin.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Eyðgerð og Jógvan Skýlindal silvurbrúdleyp

Týsdagin 15. juli hava hjúnini Eyðgerð og Jógvan Skýlindal í Havn silvurbrúdleyp. Eyðgerð er dóttir Almu, f. Berg, ættað úr Klaksvík, og Jens Askildsen úr Havn. Jógvan er sonur Herthu, f. Mikkelsen, av Toftum og Páll Skylindal úr Havn. Eyðgerð er fødd og uppvaksin í Havn. Liðug við skúlan byrjaði hon á Landssjúkrahúsinum, fyrst á uppihaldsdeildini síðan á barnadeildini, har hon í 2000 hevði sín 25 ára starvsdag. Jógvan hevur saman við foreldrum sínum búð í Havn, í Keypmannahavn, á Eiði og í Reykjavík. Hann hevur arbeitt sum bil-førari hjá



Frants Restorff, koyrt býbuss í Havn og sum bilførari hjá PM heilsølu í Havn. Seinastu árini hevur hann arbeitt nógv við kristiligum arbeiði, sum t.d. á Kristiliga Kringvarpinum, Lindini. Eyðgerð og Jógvan búgva á Norðasta Horni í Havn og eiga sonin Páll. Silvurbrúdleypsdagin eru tey stødd á Tenerifa.

### Edith Mørkøre – kunstnaratiltak í Havnar Timburhandli

24 ára gamla Edith Mørkøre av Argjum, búsitandi í Hoyvík, er í handilslæru á Ìtrivsdeildini Panduro hobby hjá Havnar Timburhandli og er í ferð við at gera sína endaligu uppgávu. Hon hevur valt at gera sína uppgávu um eina ávísa vøru, nevniliga Artisan vatnupploysandi oljumáling. Hetta heldur hon verða sera spennandi, av tí at henni sjálvari dámar væl at mála. Hon prýddi vindeygu, gjørdi eitt galaríhorn, eitt lítið atelier í handlinum, skipaði fyri kunstnaratiltaki, spurnarkapping og setti vørur fram til kundan at royna seg við o.s.fr.

Leygardagin 21. juni var eitt kunstnaratiltak í Ìtrivsdeildini hjá Havnar Timb-



urhandli. Maria Mørkøre, listakvinna úr Klaksvík, málaði við Artisan vatnupploysandi oljumáling. Nógv fólk vóru inni á gólvinum hendan dagin, tey fingu ein kaffimunn afturvið einum práti um at mála. Eisini kundu tey luttaka í eini spurnarkapping, har møguleiki var at vinna ymiskt Artisan tilfar. Spurningar vórðu settir sum t.d. "hvønn lit fært tú, um tú blandar reytt og gult?" so kundu tey royna seg við at taka pensilin og blanda hesar litir saman og finna fram til úrslitið. Maria sýndi fram 20 myndir, ið eru málaðar við Artisan oljumáling. Hon málar dagliga við oljumáling í læntum høli í Klaksvík. Orsøkin er at oljumálingin lugtar so sterkt, at tað ikki kann gerast heima. Seinastu tíðina hevur hon ikki havt umstøður til at verða nógv burtur heimanífrá, av tí at hon hevur tvey børn, eina gentu uppá 2 ár og eina uppá tveir mánaðir. Nú hevur Maria roynt Artisan málingina í 6 vikur, og dámar henni hesa vøruna væl, serliga av tí at hon kann arbeiða, meðan hon er heima hjá sær sjálvari. Maria heldur at munurin millun at arbeiða við hesari vatnupploysandi oljumálingini og vanligari oljumáling, sum skal blandast við terpentin ikki er stórur. Myndirnar vórðu sýndar fram til og við týsdagin 1. juli, har tey sum kundu hugsa sær at fari í gongd við at mála, kundu koma inn á gólvið og royna hesa máling. Edith Mørkøre skal til Danmarkar at framleggja sína endaligu uppgávu í september.

# Julian Mikkelsen givin við skúlabarnakoyringini

Eftir at hava koyrt skúlabørn fyri Kvívíkar Kommunu í 21 ár, gavst Julian Mikkelsen í Kvívík, sum nú er 71 ára gamal, við hesi koyring, tá skúlabørnini fóru í summarfrí. Hann hevur koyrt skúlabørn, sum ganga í framhaldsdeildini, frá Skælingi, Leynum, Stykkinum, Kvívík og Válinum til Vestmanna Skúla. Julian hevur dámt væl hetta arbeiði, hann hevur havt ein buss og ein persónbil. Persónbilin hevur hann serliga brúkt til at koyra til Skælings, har vegurin er smalur og ofta ring koyrilíkindi eru um veturin.

Julian er annars sørvingur, sonur Hansinu, f. Hansen, og Hans Mikkelsen, skipara, ættaður úr Gásadali. Julian er útbúgvin skipari og sigldi frá 1947 til 1978, tá hann legðist upp á land og fekk skúlabarnakoyringina í 1982. Hann spældi eitt ár við 1. deild hjá HB, meðan hann gekk upp á skúla í



*Símin Simonsen, skúlastjóri í Vestmanna Skúla, og Julian Mikkelsen, sum nú er givin við skúlabarnakoyringini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Havn í 1958. Hann er giftur við Sunnevu, f. Petersen, úr Kvívík. Tey búgva í Kvívík og eiga 4 børn, tveir dreingir og tvær gentur. Á eini samkomu í Vestmanna Skúla, tá næmingarnir fingu prógv, handaði skúlastjórin, Símin Simonsen, Juliani eitt blómutyssi og takkaði honum fyri tíðina. Hann segði m.a. at Julian hevði altíð verið ógvuliga beinasamur og góður at heita á. Julian fekk eisini blómur frá Kvívíkar Skúla.

## Merkismaður 75 ár



Mánadagin 14. juli varð Palli Dalsgaard, ella Palli á Mølini, sum hann verður nevndur her, 75.

Palli hevur verið ein merkismaður. Sum ungur hevði hann bilar saman við pápa og beiggja sínum. Tað var ikki altíð sum at siga tað. Oyggin var avstongd, bilar vóru ikki fluttir millum oyggjarnar tá sum nú, so alt viðlíkahald og umvælingar mátti gerast í bygdini við lítlum og ongum amboðum. Ein dugir nú at síggja, hvat kolosalt arbeiði varð lagt í at fá tað at ganga. Glintið var altíð at hoyra úr bilskúrinum, bæði tíðliga og seint. Eitt ið sermerkti bilarnar, var hvussu væl teir vóru hildnir. Ikki mundi altíð tímalønin vera so stór og var hann tí onkuntíð til skips innímillum.

Seinni skifti hann arbeiði og var vegmaður; men av ringari heilsu helt hann uppat við hesum og varð síðani skrivstovumaður í nógv ár.

Nógv ogn var í húsinum, og hevur hann havt stóran áhuga fyri seyði. Hann var hagstýrisformaður fyri Dalin og dugdi sera væl at skipa fyri øllum tí ið hoyrdi til hetta. Hagin var í góðum hondum.

Palli hevur haft stóran áhuga í samfelagnum og eisini bygdasamfelagnum. Verið livandi í tí sum fyrifórst, hevur dámt væl føroyskan dans og fingið dans at gingið. Í bygdarráðnum sat hann í nógv ár. Tað var ikki altíð so lætt. Hann hevur havt sína avgjørdu meining og sagt hana viðhvørt alment í lesarabrøvum. Hann hevur verið ein trivaligur maður, tað sæst best á hansara vælumsitna búna á Sævarangi.

Júst nú hevur hann fingið eina bók um staðanøvn í Skálavík útgivna. Hetta er eitt vælaverk, sera áhugavert, og væl úr hondum greitt. Bókin er ein stórur skattur fyri bygdina, ið kann vera stolt av henni.

Undirritaða hevur hann mangan verið góður í ráðum og altíð rætt eina hjálpandi hond, tá á hevur staðið. Hetta hevur alt verið í tí stilla.

Hjartaliga tillukku og bestu ynskir.

**Bjarni**

### Dagurin

**15. juli. Ápostlarnir skiljast.** Miðaldar søgn sigur frá, at á hesum degi fóru ápostlarnir hvør í sína ætt at gera eftir boðum Jesu (Matt. 28, 19). Tummas og Bartolomeus fóru eystureftir, Símun og Matteus suðureftir, Filippus og Judas Taddeus norðureftir og hinir lærusveinarnir ymsar vegir. Søgan sigur eisini, at áðrenn teir skiltust, settu teir saman ápostólsku trúarjáttanina.